## Náttúru- og umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins 2001

Norðurlandaráðið fer aftur í ár at veita einum persóni ella felagskapi Náttúru- og umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins. Virðislønin, ið er 350.000 danskar krónur, verður latin fyritøku, bólki ella einstaklingi, sum hevur víst serligt hegni innan umhvørvisvernd.

Evnið í 2001 er
**»Norðurlendsk ábyrgd at alheims umhvørvi«**

Øll hava ábyrgd at skapa eitt trygt umhvørvi, og skulu heimsins umhvørvisvandamál loysast, er tað ein fyritreyt at arbeitt verður tvørtur um landamørk. Stremban ímóti umhvørvistrupulleikum í norðurlondum og uttanfyri norðurlond vil tí verða við til at skapa betri liviumstøður kring allan heim.

Norðurlendska náttúru- og umhvørvisvirðislønin verður í ár latin felagsskapi ella einstaklingi í einum av norðurlondunum, sum hevur víst serligt hegni í samstarvinum við menningarlond fyri at loysa umhvørvisvandamál.

Øll kunnu lata inn uppskot um virðislønarvinnara. Uppskotið skal innihalda lýsing arbeiðinum og upplýsingar um, hvør hevur framt ella fer at fremja hetta arbeiðið. Arbeiðið skal hava fakliga góðsku og týdning í breiðum samanhangi í einum ella fleiri av norðurlondunum. Uppskotið skal orðast á í mesta lagi tveimum A4 síðum.

Virðislønarmóttakarin verður útnevndur av eini dómsnevnd, ið hevur umboðan úr Grønlandi, Íslandi, Føroyum, Noregi, Danmark, Álandi, Finnlandi og Svøríki.

Uppskotini, ið skulu skrivast á eitt serligt skjal, skulu vera inni í seinasta lagi 25. mai. Skjalið fæst á heimasíðu Norðurlandaráðsins www.norden.org ella við at venda sær til skrivstovuna hjá føroysku sendinevndini:

**Norðurlandaráðið**
Føroyska sendinevndin
Erling Jallsgøta 6
100 Tórshavn
tlf. 311000 · fax 310686

## ESVAGT-THOR

## Spennandi størv innan frálandavinnu

**Skiparar/stýrimenn, maskinmenn, kokkar og dekkarar.**

**Størvini:**
Eru í høvðusheitum umborð á standby skipum.

**Krøv og ábyrgd:**
Starvsfólkið fær ábyrgd av, at formligu reglurnar á økinum verða fylgdar, og at arbeiðsgongdir eru í tráð við málsetning virkisins.
Starvsfólkið skal til eina og hvørja tíð kunna verða flutt umborð á onnur skip hjá A/S ESVAGT ella P/F THOR.

**Førleikakrøv:**
Skiparar/stýrimenn:
- Vinnubræv sum skipsførarar/skiparar við STCW átekning II/2
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Trygdarskeið, ikki eldri enn 5 ár
- Roykkavara/sløkkileiðaraskeið
- GMDSS skeið
- ARPA skeið
- Kunnleika til ISM og ISO 9000 Góðskustýring (fyrimunur, tó eingin treyt)
- Væl fyri í enskum, bæði í skrift og talu
- Fysiskt væl fyri
- Kunnleika til D.P útgerð (fyrimunur, tó eingin treyt)

**Maskinmenn:**
- Vinnubræv sum maskinmeistarar við STCW átekning III/2
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Trygdarskeið, ikki eldri enn 5 ár
- Roykkavara/sløkkileiðaraskeið
- Væl fyri í enskum, bæði í skrift og talu
- Fysiskt væl fyri

**Kokkar:**
- Vinnubræv sum skipskokkar
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Trygdarskeið, ikki eldri enn 5 ár
- Roykkavara/sløkkiskeið
- Væl fyri í enskum, bæði í skrift og talu
- Fysiskt væl fyri

**Dekkara:**
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Trygdarskeið, ikki eldri enn 5 ár
- Væl fyri í enskum, bæði í skrift og talu
- Fysiskt væl fyri

**Løn og setanartreytir:**
Verða ásettar eftir avtalu.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avritum av prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til **P/F THOR, 420 Hósvík,** í seinasta lagi 14.04.2001.
Nærri upplýsingar fáast, við at venda sær til **Gunnbjørn Joensen**, tlf. 42 25 03.

P/F ESVAGT-THOR er eitt felag, sum í høvuðsheitum arbeiðir innan oljuvinnuna, herundir trygd og umhvørvisvernd. Meira sæst á heimasíðu okkara www.thor.fo

## Føroya Felag Móti Krabbameini

Aðalfundur felagsins verður í J. Patursonargøtu 24, týsdagin 24. apríl 2001, kl. 19.00.

Skrá sambært lógum.

**Føroya Felag móti Krabbameini**

## Bygningur til sølu í Skopun

Á ídnaðarøkinum í Skopun er verkstaðsbygningur við innrættaðum skrivstovuhølum til sølu.

Bygningurin er uml. 200 m².

Niðara hædd er innrættað sum verkstaður.

Ovara hædd er innrættað sum skrivstova.

**P/F J & K Petersen**
Tlf. 315060

## Skrivstovufólk

Søkt verður eftir skrivstovufólki til ein av kundum okkara, at byrja beinanvegin ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðið fevnir um bókføring og lønaroknskap, umframt alt vanligt skrivstovuarbeiði.

**Førleiki:**
Útbúgving innan bókhald/skrivstovuarbeiði og ella royndir frá bókhaldsarbeiði/skrivstovuarbeiði er ein fyrimunur, eins og kunnleiki til nýtslu av teldu.

**Løn:**
Løn verður goldin smb. avtalu.

**Upplýsingar og umsókn:**
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Dianu Heinesen, tlf. 441666. Umsókn við avritum av møguligum prógvum skal sendast til Spf Grannskoðarastovan, 480 Skála, innan 15/4-2001.

**Spf Grannskoðarastovan**
480 Skála
Tlf. 441666

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
i

## Haldarar hjá Dimmalætting og Sosialinum,

sum ikki fáa leygardagsbløðini, verða biðin um at ringja tlf. 253497 leygardag millum kl. 11 og 14

**Prentmiðstøðin**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo



## GEM

The Geotechnical, Environmental and Metocean Network

### Hevur opið hús og móttøku á Hotel Føroyum

### 3. april 2001, kl. 19.00-20.30

Í hesum sambandi fara serfrøðingar frá oljufeløgunum og granskingarstovnum at greiða frá og sýna fram úrslit innan greinirnar: jarðtøkni, umhvørvi, havfrøði og tilbúgving.

**Verkætlanirnar fevna millum annað um:**

· Kanning av jarðfrøðiligum vandum
· Oljudálkingar myndil
· Árinsmeting av umhvørvinum
· Sjóðafallsmodell
· Skipaferðslumynstrið

Endamálið við GEM hevur verið at savna dátur um føroyska umhvørvisøkið, fyri at oljufeløgini kunnu gera neyðugar fyrireikingar til at bora eftir olju á ein tryggan og umhvørvisliga ábyrgdarfullan hátt.

### Øll eru vælkomin

GEM

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

## Skrivari
## til Vinnumálastýrið

Eitt starv sum skrivari í Vinnumálastýrinum er leyst til setan 1. mai 2001 ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðið fevnir um vanligt skrivstovuarbeiði, herímillum:
- at vera skrivari hjá landsstýrismanninum
- at rættlesa útgangandi skjøl og frágreiðingar hjá Vinnumálastýrinum
- at umseta til og úr donskum og enskum
- at hava um hendi samskifti við:
  - Løgdeildina á Løgmansskrivstovuni í sambandi við lógaruppskot
  - Løgtingið í sambandi við svar uppá fyrispurningar til landsstýrismannin
- at taka telefon (vekslaran) og taka ímóti fólki
- aðrar skrivstovuuppgávur

Vit hugsa okkum, at tú hevur:
- skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving
- kunnleika til almenna fyrisiting
- hollan kunnleika til føroyskt, danskt og enskt
- kunnleika til EDV á brúkarastøði
- góð samstarvsevni

Vit bjóða:
Eitt fjølbroytt og spennandi starv, sum tú sjálv/sjálvur verður við til at skapa, til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi við góðum skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikum.

Lønar- og setanartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Vinnumálastýrið og stovnar undir tí umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum, starvsroyndum o.ø. verða sendar til:

Vinnumálastýrið
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn

og mugu vera stýrinum í hendi seinast 25. apríl 2001.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Ara Johanneson, deildarstjóra í Vinnumálastýrinum, tel 35 60 60.

**VINNUMÁLASTÝRIÐ**

## 2 Pedagogar

søkjast til dagstovnin í Gøtu.

1 pedagogur søkist til arbeiðið 30 t. um vikuna í vøggustovu við 15 plássum 0-2 ár. Frá 25.05.01 til 25.02.02, fyri pedagog í barnsburðarfarloyvið.

1 pedagogur søkist til arbeiðið 35 t. um vikuna í smábarnastovu við 18 plássum 2-4 ár. Frá 11.06.01 til 02.01.02, fyri pedagog í barnsburðarfarloyvið.

Størvini verða lønt sambært sáttmála ímillum Føroya Kommuna Arbeiðsgevarafelag og Føroya Pedagogfelag. Lønarflokkur 11/13.

Um eingin pedagogur søkist verður hjálparfólk sett.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Torgerð Hansen, tlf. 442012 lokal 10.

Skrivlig umsókn við avritum av prógvum, viðmælum um v.m. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 17.04.01.

**Dagstovnurin í Gøtu**
boks 32
511 Gøtugjógv

www.sosialurin.fo

## Frá S&K-felagnum

Treytað av nóg góðari undirtøku, verður skipað fyri skeiðnum

**Word**

20., 27. apríl, 4. og 9. mai 2001 hvønn dag frá kl. 8.30-12.15.

Skeiðið verður hildið á Føroya Handilsskúla og lærari verður Steinbjørn í Dali.

**Tilmelding innan 9. apríl 2001.**

**S&K-felagið**
tlf. 316837 • fax 310451
e-mail: skfelag@post.olivant.fo

Sosialurin
Sosialurin
-har tað hendir

## FK søkir eftir reingerðarfólki skjótast gjørligt

at gera reint í handlinum 14 tímar um vikuna.

Vit vænta av tí fólki, ið sett verður, at tað er ábyrgdarfult, nærlagt, sjálvstøðugt og vísir lýdni.

Løn samb. sáttmála Havnar arbeiðskvinnufelags.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:
Bo Møller Hansen, tlf. 311320 ella 217593.

Seinasta freist at søkja: 18. apríl 2001.

**FK í Miðbýnum**